gult cyan magenta svart



# TILTØK

## FØÐINGAR

6. mars fingu Hjørdis Hansen, Oyri og Jóhan Olsen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4200 gr.

6. mars fingu Anja og Hans Petur Clementsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3650 gr.

8. mars fingu Jórun Eyðunsson og Petur M. Danielsen, Porkeri, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3720 gr.

9. mars fingu Joan Vágsheyg Balvinson og Finn Balvinson, Klaksvík, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3600 gr.

11. mars fingu Mariann Nattestad og Birgir Joensen, Miðvágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3400 gr.

12. mars fingu Maud Elmarsdóttir og Mads Andrias Winther Olsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4050 gr.

12. mars fingu Barbara Magnussen, Vestmanna og Oddmar á Høgabóli, Miðvágur, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3065 gr.

13. mars fingu Anita L. Hammer og Jóhann Fagraklett, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3400 gr.

13. mars fingu Ambjørg Danielsen og John Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3850 gr.

13. mars fingu Sanvør Hansen og Gunnar Joensen, Kollafjørður, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3900 gr.

13. mars fingu Andrea Heindriksdóttir og Ragnar A. Jacobsen, ein son. Hann var 54 c. langur og vigaði 4150 gr.

14. mars fingu Petra Olsen, Sandavágur og Andrias Jensen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 3300 gr.

15. mars fingu Pavla og Hilmar Eliasen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3700 gr.

## ANDLÁT

**06. mars:**
Cesilia Heinesen, Reykjavík, vanliga nevnd Silla í Brekkuni, Klaksvík, 79 ár.

**07. mars:**
Vilhelmina Dam á Lava, í Tórshavn, vanliga nevnd Minna á Lava, 78 ár.
Tórleif Hammer, úr Vági, búsitandi í Norra, 63 ár.

**08. mars:**
Símun Joensen, í Klaksvík, 87 ár.
Rebekka Djurhuus, ættað av Skála, búsitandi í Havn, 80 ár.
Anna Olsen, Kirkval, Tvøroyri, 83 ár.

**09. mars:**
Tummas Enok Hansen, Vestmanna, 82 ár.

**11. mars:**
Hjørdis Grækarisdóttir Therkelsen, ættað úr Kvívík, búsitandi í Tårnby, 84 ár.

**13. mars:**
Kristian Viderø Simonsen, Sandur, 40 ár.

**14.03.**
Jógvan Vilhelmsen, ættaður úr Syðradali á Kallsoynni, búsitandi í Klaksvík, 81 ár.

## 80 ár

Í dag, 17. mars verður Kristian Rókustein, Fuglafjørður, 80 ár. Hann er burturstaddur.

### Gudstænastur
***3. sunnudagur í føstu***
*Hvalvík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Vestmanna:* kl. 12,
*Sandavágur:* kl. 18, Inga Poulsen Dam
*Kvívík:* kl. 17, føstugudstænasta: Urguleikari: Símun Hammer
*Søldarfjørður:* kl. 11, altargangur, Meinhard Bjartalíð
*Christianskirkjan:* kl. 11, Niels Pauli Danielsen
Leirvík: kl. 12, altarg.,
*Funningsfjørður:* kl. 16, altarg., Uni Næs
Vesturkirkjan: kl. 11,
*Kirkjubøur:* kl. 12.30, Heri Joensen
*Hestur:* kl. 12, altarg., Bergur D. Joensen
*Viðareiði:* kl. 12, Elsa Funding
*Havnar kirkja:* kl. 11, Bjarni Bæk
*Nólsoy:* kl. 12, kl. 15 barnagudstænasta, Sonja Klein
*Hvalba:* kl. 12, Ólavur Rasmussen
*Sumba:* kl. 12, Erland Beder
*Sandur:* kl. 12,
*Skopun:* kl. 16, altarg., Jákup R. Hansen
*Eiði:* kl. 11.40, skriftamál, kl. 12 messa,
*Norðskála:* kl. 17 messa, Emil Olsen
*Skála:* kl. 11, Jógvan Fríðriksson
*Sørvágur:* kl. 12, David Johannesen

### Ebenezer
Ungdómssamfelagsmøtini halda fram. Í dag verða møti kl. 16 og kl. 20. Kl. 22 verður opið hús.
Sunnudagin kl. 10 breyðbróting, sunnudagsskúli kl. 12 og evangel. møti kl. 17.
Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

### Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond
Morgunmøti kl. 11, kl. 12.15 sunnudagsskúli, kl. 18 evangeliskt møti.

### Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn, kl. 20 møtirøð í lærarask úlahøllini – Karisma, í morgin kl. 11 morgunmøti v/Símun Absalonsen, kl. 18 møtirøð í læraraskúlahøllini – Karisma.
Mánakvøldið kl. 20 bønarskúlin.
Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

### Meinigheitshúsið í Havn
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Hans Eiler Hammer.
Innsavnan til ytrimissión, barnaansing er meðan møti er.
Mánakvøldið kl. 19 verður LU-arbeiðið. Filmur: I skyggen af korset (1. partur) kl. 20 venur Manskórið.

### Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti.

### Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19.30 A.T.A.P. (barnaklubbi).
Onki ungdómsmøti í Rhema leygarkvøldið vegna karisma møti í Læraraskúlahøllini um vikuskiftið – fríggja- og leygarkvøldið kl. 20, sunnukvøldið kl. 18. Øll eru vælkomin.

### Meinigheitin í Hoyvík
Í Hoyvíkar skúla sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Svenhild og Harald Haraldsen, Beinta og Marjun syngja. Øll eru vælkomin.

### KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Heina Petersen um Mikkjal á Ryggi.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

### Frelsunarherurin í Tórshavn
Vitjan av kommandørunum Berit og B. Donald Ødegaard, leiðarar fyri Noreg, Ísland og Føroyar frá 16. til 18. mars. Major Knut Gamst luttekur.
Fríggjadagin kl. 20 møti.
Leygardagin kl. 20 møti.
Sunnudagin kl. 11 møti, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 15 soldatmøti, kl. 18 møti, sjónvarpsupptøka.
Mánadagin kl. 17 skótar.

### Kirkju- og missiónshúsið á Argjum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli og Junior. Kl. 18 møti.
Mánakvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Týskvøldið kl. 20 venur Argjakórið – nýggir limir eru vælkomnir.
Mikumorgunin kl. 07 bønarløta.
Hóskvøldið kl. 20 Føstugangsgudstænasta.
Heimasíða okkara: www.koma.fo

### Havnar kirkja
Eystankórið við Símuni Nónklett hevur matiné (tónleikaløtu) í Dómkirkjuni leygardagin 17. mars kl. 11.30.

### »Tíð til Gud«
verður í Pállstovu í Havn sunnukvøldið kl. 21. Hesuferð verður fríður vitnisburður. Dánjal av Rana og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

### Evangel. møti í Royndarhúsinum í Nólsoy
Leygardagin kl. 15 barnamøti, kl. 20 evangel. møti.
Sunnudagin kl. 14 barnamøti og evangel. møti kl. 16 við Tórmund, Jaspur og fleiri.

### Hvalvíkar missiónshús
Sunnudagin kl. 14.30 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Mourits Mouritsen o.ø. Meinigheitskórið í Havn syngur. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Filadelfia, Sundalagi
Í morgin kl. 18 kvøldmøti við Sam Jakobsen.
Mikudagin frá kl. 19-21 Miðdepilin, eitt trivnaðarstað fyri ung.

### Saron, Vestmanna
Sunnudagin onki møti vegna møtirøðina undir heitinum »Eitt í Kristusi« í læraraskúlahøllini.
Fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnudagin kl. 18. Mánadagin kl. 20 bønarmøti í Saron.

### Missiónshúsið í Gøtu
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20. Øll eru vælkomin.

### Skála meinigheitshús
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Evnið verður: »Hvat er synd?«. Aftaná fara vit við bilum út til Runavíkar á Gospel konsert. Øll eru hjartaliga vælkomin.
**Sjómanskvinnuringurin** kemur saman mánakvøldið kl. 19.30. Sunnumorgunin verður farið til Havnar, bussur fer frá meinigheitshúsinum kl. 9.45.

### Missiónshúsið á Strondum
Sjómanskvinnuringurin Selatræ, Strendur, Skála og Skálabotn. Bussur fer frá Missiónshúsinum á Strondum til Havnar sunnumorgunin kl. 9.30.

## EITT LJÓS Á GØTU MÍNI

*Tíggjunda boð: Tu mást ikki girnast konu næsta tíns, ikki húskall ella arbeiðskonu hansara, ikki fæ hansara ella nakað, sum næsti tín eigur.*

Tey bæði seinastu boðini líkjast nógv og hava vist áður verið eitt samlað boð. Orðið girnd leiðir ofta tankan móti tí kynsliga og freisting, og harvið eisini hugsan um sætta boð. At fáa hug á konu hjá øðrum manni og koma kynsliga teirra millum er brot á sætta boð, eingin ivi um tað. Og tað hevur skapað nógvar trúpulleikar og fløkjur í mongum heimum og familjum.

Men girnd kann vera so nógv annað, sum hevur keðiligar fylgjur við sær. Eitt bíbilorð sigur: Men ein og hvør verður freistaður, tá ið hann verður drigin og lokkaður av síni egnu girnd. Síðan, tá ið girndin hevur gitið, ber hon synd; men tá ið syndin er fullbúgvin, føðir hon deyða. Girndirnar eru nógvar, sum allar eins væl kunnu freista til tankar, orð og gerðir, sum føra til synd og brot á boðini, við deyða og ævigari glatan til fylgju.

Boðini eru leiðbeiningar, sum eru givnar okkum fyri at gera lívið lættari at liva. Tey eru eisini ein grundvøllur, sum okkara samfelagsskipan byggir á. Tey eru Guds vilji, givin okkum til leiðbeiningar. Men vit verða ikki fullkomin, um vit so halda øll boðini. Innan ymiskar átrúnaðir eru nógv menniskju, sum vilja gera seg fullkomin við ymiskum tiltøkum. Eftir okkara kristnu áskoðan er hetta ikki gjørligt.

Vit kunnu ikki gera okkum fullkomin. Men vit vilja so fegin gera okkurt, og spyrja eins og ungi maðurin: Hvat gott skal eg gera, at eg kann fáa ævigt lív? Jesus vísir til boðini, men tey hevur unglingin øll hildið frá barnaárum av, og hann kennir á sær, at enn vantar nakað. Jesus setir so fleiri krøv til hansara, men hetta er honum ovmikið. Vit kunnu ikki sjálv gera okkum fullkomin. Jesus endar samrøðuna við at biðja hann koma at fylgja sær. Tað skuldi verið leiðin hjá okkum eisini.

Prædikarin sigur: Niðurløgan, tá ið alt er hoyrt, er: Óttast Gud og halt boð hansara, tí at tað eigur hvør maður at gera.

**Sigvald Kristiansen**



# TILTØK

### Páskastevnan 2001
verður í ítróttarhøllini á Skála. Byrjað verður skírishóskvøld. (Nærri verður lýst í bløðunum seinni)

### Keldan, Skálafirði
Leygarkvøldið kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti við Jastrid og Paula Høj. Karisma møtirøðin verður í læraraskúlanum í Havn fríggja- og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18.

### Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará við Martin Olsen, Rituvík. Húsmøti verður í Søldafirði týsdagin kl. 19 hjá Maybritt og Trúgva. Verið hjartaliga vælkomin.

### Bíbliuskeiðrøðin
yvir evni hin sanni lærisveinurin verður hildin í hølum hjá arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará. Møtiskeiðrøðin heldur áfram hvønn mánadag kl. 19. Stigtakari og bíbillærari er David Bech.

### Missiónshúsið í Leirvík
Í kvøld verður ungdómsmøti við luttøku úr Klaksvík. Byrja verður kl. 19 við grýturætti. Kl. 22 koyra bussar í samband við kosertina í høllini í Runavík (sigið frá áðrenn). Sunnukvøldið kl. 18 møti, har ung úr Leirvík skipa fyri, Reimund Langgaard talar. Øll eru vælkomin.

### Lívsins Orð
Barnamøti verður í dag kl. 17.30.
Sunnumorgunin kl. 10.30 verður møti við Pola Jacobsen. Vegna møtirøðina hjá Karisma í Læraraskúlahøllini í Havn verður onki opið hús leygarkvøldið og onki evangeliskt møti sunnukvøldið.
Mánadagin kl. 17 møta »Liljurnar« – gentur 7-13 ár.

### Soli Deo Gloria
Mánakvøldið kl. 20 bíbliutími og bønarmøti.
Mikukvøldið kl. 20 kvinnurnar samlast.
Hóskvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 opið hús við Jónfinn.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 16.30 Alphaskeið (11-15 ár) møti er flutt til kl. 17, Jónfinn talar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Missiónshúsið í Skopun
Møti kl. 20, Kajberg Davidsen og Sigfred Johannesen tala. Kórið í Skopun syngur.
Sunnudagin kl. 14 familjumøti v/Hildibeth og Rúna Hentze. Gentukórið syngur. Kl. 16 gudstænasta v/altargongd, Jákup R. Hansen, prestur. Kl. 19 møti, Regin Høgnesen talar. Manskórið syngur. Bønar- og lovsongsløta verður hálvan tíma áðrenn hvørt møti. Innsavnan verður fríggja-, leygar- og sunnukvøldið.

## BRÚDLEYP

Í dag, 17. mars kl. 15.00 giftast í Nes kirkju Sólbjørn Jensen, Fuglafjørður og Margith Poulsen, Skipanes. Veitslan verður hildin fyri innbodnum í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Leygardagin 5. mai giftast í Miðvágs kirkju kl. 16.30, Sólbjørg Lindenskov, Nólsoy og Napolion Magnussen, Miðvágur. Tey, ið vilja gleða brúðarparið við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá áðrenn 22. apríl á tlf. 327016, 333174 ella 332692.

## LÆKNAVAKTIR

*Tórshavn:*
Læknavaktin tlf. 310033

*Eysturoy:*
Leygard. 17. mars: Andreas Petersen, tlf. 441086
Sunnud. 18. mars: Pól Jóhs. í Horni, tlf. 444038

*Norðoyggjar:*
Læknavaktin tlf. 458888

*Vágar:* tlf. 332413

*Suðuroy* (norður): tlf. 371560
*Suðuroy* (suður): tlf. 373030

*Tannlæknavakt, Tórshavn*
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

### Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Tom og Kára. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Frelsunarherurin í Vági
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Sámal, Gimma og Magnus. Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

### Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbyggingarfundur.

### Frá Felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 14.00 í Jákupsstovu, J. Patursonargøta 24, 100 Tórshavn. Nærri fæst at vita hjá Annvør Nielsen tlf. 317261, Helle Johansen tlf. 317940 ella Sólgerð Foldbo tlf. 422184.

### Føroyskt-Amerikanskt Vinafelag
Sunnudagin 18. mars skipar Føroyskt-Amerikanskt Vinafelag fyri fundi í Mettustovu í Havn. Fyrrverandi AFS'arar – Turið Holm, Marianna Debes Dahl og Hans Martin Nielsen – koma at siga frá upplivingum í USA. Kostnaður fyir høli og ein drekkamunn: 50 kr. luttakari. Møtið fjølment.

### Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

### VBA-fundir
Fundur fyri vaksin børn hjá alkoholikarum/ella ørkymlandi familjuviðurskiftum, eru hvørt leygarkvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 (opin fundur). Fundirnir eru á Vaskarínum, Tórsgøta 5.

### AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Leygardagin: kl. 17-18.
Sunnudagin: kl. 11-12.

### Spælistovan í Meinigheitshúsinum í Havn
er opin mánadag-mikudag og hósdag frá kl. 9.00-12.00 fyri foreldur at børnum uttan ansing.

### Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18.
Týsdag-fríggjadag 10-17.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 19.3.*
kl. 9.45-10.15 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 10.15-12 Seyma fýrkantar saman til teppir til móður Theresufelagskapin. Tilm. til døgurðan mikudagin tlf. 316491
*Týsdagin 20.3.*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Kristindómurin og tað føroyska málið, Jóhan H. W. Poulsen
*Mikudagin 21.3.*
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði (tilm. mánadag 316491)
kl. 14.30 Túrur niðan í Norðurlandahúsið, listaframsýning í Klingruni, Magnús Kjartansson.
*Hósdagin 22.3.*
kl. 10.30-11 Fimleikur. Sonja Danielsen
kl. 14-17 Telduprát á 1. hædd, Brandur Petersen
*Fríggjadagin 23.3.*
kl. 10-17 Opið hús.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

### Felagið Tórshavn gongutúrur
Leygardagin 17. mars verður gongutúrur í Havn. Byrjað verður á Bilasavninum í Gráasteinsbrunninum kl. 15. Aftaná verður gingið heim í býin eftir sniðgøtum niðanfyri Landavegin. Tilmelding.

### Pensionistafelagið í Havn
Í føstuni møtast vit hvørt hóskvøld kl. 19 í Losjuni, Tinghúsvegur 18. Hevur tú fylt 60 ár, er tú vælkomin at gerast limur.

### LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geils-gøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14.00 til 20.00 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldupost-ur lisa@lisa.fo – heima-síða www.lisa.fo

### Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

### KRIS í Føroyum
Ráðgevingar og viðtalu telefonin er nú opin hvørt mánakvøld og hóskvøld á tlf. 458181 frá kl. 20-22. Møguleiki er eisini fyri at skriva beinleiðis til felagið á adr.: KRIS í Føroyum, boks 345, 700 Klaksvík.

### Amnesty International
Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.

### Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiski-menn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Nor-egi. Lima-gjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

### Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

### Føroya Astma/Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Íslandsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

### Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15. Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

### Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovu-tíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Rand-fríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

### MBF-skrivstovan
Íslandsvegur 10c
Tlf. 317373 · Fax 310813
e-mail: mbf@post.olivant.fo
Skrivstovan er opin gerandisdagar kl. 8.30-16.00.

### Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupost-adr. deaf_fo@-post.-olivant.fo

### Føroyingafelagið í Odense
hevur opið hvørt fríggjakvøld frá kl. 20. Tú finnur okkum á Rugårdsvej 21 (kjallarin), 5000 Odense C.
Tlf.: 25395563
Teldupostur: ffo@post.gs
www.ffo.subnet.dk

### Føroyingafelagið í Esbjerg
Danmarksgade 25, 6700 Esbjerg, tlf. 75132747
Opið hvørt mánakvøld kl. 19–22, har tú ert vælkomin at lesa bløðini, spæla kort og keypa tær ein kaffimunn.

### Føroyingafelagið Vesturskin, Bergen
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Nærri upplýsingar við at venda sær til Sørin Danielsen, tlf. 56147684 ella Elsebeth Reines, tlf. 55229049.

### Heimamissiónin
Hevur tú tørv á hjálp til at koma í ein kristnan felagsskap, ella ynskir tú at hjálpa til í andaligum arbeiði á fólkakirkjunnar grund í Danmark, so kanst tú ringja til: Hera Elttør, Aulum, tlf. 97473786, Jan Johannesen, Køb. tlf. 32886918/26272112, Birgir Johannesen, Køb. tlf. 35854159 ella Torleif Johannesen, Nes, tlf. 449024.

### Føroyingafelagið í Reykjavík
Ølduslóð 27
220 Hafnafjørður, Ísland
Tlf. 565 4883
E-mail: forrek@visir.is

### Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark
Vesterbrogade 17A
1620 København V
Tlf. 33239980
Fax: 33239234
Teldupostur: fo.raadgivning@get2net.dk
Hjálp og vegleiðing í sosialum, persónligum og lestrarligum spurningum. Opið er: Mána-dag, týsdag og hósdag kl. 11.30-15.30, mikudag kl. 14.00-18.00, fríggjadag stongt (donsk tíð).

### Føroyingar í Noregi
E-mail: foroyar@norden.no
Heimasíða:http://www.norden.no/foroyar
Norsk-Færøysk Lag skipar javnan fyri tiltøkum fyri føroyingum og fólki við til-knýti til Føroyar. Tiltøkini verða hildin í Oslo, og nærri upplýsingar um tíð og stað fáast við at venda sær til felagið á tlf. +4722674829.

### Føroyingarfelagið í Aalborg
Lille Kongens Gade 10 B.
Tel. 98136330
E-mail: ffaalborg@mail.tele.dk
Álaborg er opin soleiðis:
Fríggjadag: Fimmarin frá 17.00 til 19.00
Leygardag: Opið hús frá 22.00 til 03.00.
Álakórið venur hvønn sunnudag kl. 18.00.
Kortkvøld er annaðhvørt fríggjakvøld frá kl. 19.00
Føroyskur dansur er annaðhvørt hóskvøld kl. 19.30.
Annars vera tiltøk, ið verða á skránni, lýst í Túna-tosi, sum kemur út einaferð um mánaðin.